Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	24. apríl 2026
Mál nr.:	26/10260
Málsviðgjørt:	DH
Ummælisfreist:	N/A
Eftirkannað:	24. apríl 2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Tíðaravmarkað mvg-frítøka av sølu av bensini og diesel)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 218 frá 22. desember 2025, verður í § 12, stk. 1, sum litra v sett:

"v) Sølu av bensin og diesel fram til og við 31. juli 2026, ið koma undir vørunumrini 2710.12.41, 2710.12.45, 2710.12.49, 2710.12.50, 2710.19.43 og 2710.19.46 í Toll- og Vøruskránni"

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í samgonguskjalinum er avtalað, at fyribilstiltøk verða sett í verk fyri at lætta um hjá fólki, nú oljuprísirnir eru hækkaðir munandi.

Brádligi prísvøksturin ger, at tey, ið brúka nógva olju til flutning, hava færri pengar til aðra nýtslu og fáa illa lagt um til aðra orku beinanvegin. Tí er politiskt ynski um at lætta um, so at broddurin verður tikin av ógvusligu hækkingini í prísinum á brennievni til flutning.

Hetta er gjørt í øðrum londum, t.d. í Norra, Svøríki og Týsklandi, har myndugleikarnir tíðaravmarkað hava lækkað ella tikið avgjøld á bensin og diesel av.

1.2. Galdandi lóggáva
Av søluni av bensini og diesel verður avroknað mvg. Einki mvg verður tó avroknað av brennioljugjaldinum, sum verður álagt á søluna av diesel.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at taka broddin av prísvøkstrinum, sum hevur verið á olju síðstu tíðina.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið ásetur, at oljufeløgini ikki skulu krevja inn mvg av sølu av bensini og diesel, frá tí at lógin er komin í gildi til og við 31. juli 2026.

Við verandi marknaðarprísum merkir tað, at prísurin á bensini og diesel til privatbrúkarar kann lækka um 2,50 kr. pr. litur. Fyri vinnuna, sum fær mvg afturborið, hevur uppskotið onga ávirkan.

Oljufeløgini, sum selja bensin og diesel umsita broytta mvg'ið, soleiðis at kundin fær prislækking beinanvegin, tá ið lógin er lýst.

Skilabest er at avmarka stuðulin til bensin og diesel. Tað er lættast at umsita og rakar har, sum prísvøksturin sæst best og merkist mest.

Húsarhald, sum brúka olju til upphiting, hava fyri tað mesta eina hitakontu, har mánaðarliga gjaldið verður stillað eina ella tvær ferðir um árið. Oljufeløgini meta, at umleið 70% hava hitakontu. Ein oljustuðul hevur ikki ávirkan fyrrenn næstu ferð, gjaldið verður stillað. Harafturat er avmarkað, hvussu ofta tangin verður fyltur. Sostatt er eingin vissa fyri, at øll høvdu fingið lut í stuðlinum, um stuðulin bert skal vera nakrar mánaðir.

Harafturat brúka húsarhaldini munandi minni olju um summarið, og tí kann stuðulin leggja stórt trýst á oljufeløgini um at fylla tangarnar, áðrenn stuðulin verður tikin av. Vandi er tá fyri, at slíkur stuðul eggjar fólki at fylla tangarnar, meðan marknaðarprísurin fyri olju enn er høgur.

SEV hevur sagt, at SEV hevur prístryggjað sína olju, og tí er óneyðugt at stuðla SEV. Harafturat er SEV somikið stórt og væl bjálvað til at klára sveiggj í marknaðinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring. Uppskotið er tó gjørt í samráði við TAKS og oljufeløgini, sum selja bensin og diesel.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið minkar um inntøkurnar frá mvg av sølu av bensini og diesel.

Seldar verða um 15 mió. litrar av bensini og 30 mió. litrar av diesel um árið, til bæði vinnu og privat. Kostnaðurin av at frítaka sølu av bensin og diesel fyri mvg fram til 31. juli 2026 er tengdur at, hvør prísurin er, býtinum millum privata og vinnuliga sølu, og nær lóggávan verður samtykt. Upplýsingar frá oljufeløgunum benda á, at nakað meira brennievni verður selt um summarið.

Talvan niðanfyri er ein roynd at rokna út kostnaðin av at frítaka sølu av bensin og diesel fyri mvg í tríggjar mánaðir.

	Mett søla, mai-juli (litrar)	Privat lutfall	Mett mvg/litur	Mvg-stuðul, mai-juli
Bensin	5.000.000	70%	2,5	8.750.000
Diesel	8.000.000	40%	2,5	8.000.000
				16.750.000

Hugsast kann, at landið fær aðrar mvg-inntøkur, um fólk keypa aðrar vørur fyri tað, sum tey spara í brennievni. Hinvegin er talan um tíðaravmarkaðan lætta, og tað verður ikki roknað við, at lættin broytir stórvegis um keypsmynstri hjá fólki.

Við frítøkuni verður lættin áleið 100 kr. til hvønn fyltan tanga. Hugsast kann tí, at nógv fylla sær tangan, áðrenn stuðulin gongur út.

Fíggjarmálaráðið metir, at kostnaðurin av frítøkuni er um 20 mió. kr. fyri landið.

Av tí at talan er um tíðaravmarkaðan stuðul, kann mvg-skipanin brúkast til at stuðla húsarhaldinum. Fíggjarmálaráðið vísir tó á, at tað kann vera óheppið at brúka mvg-skipanina til at veita stuðul, tí at undantøk og frádráttir í mvg-skipanini minka um avgjaldsgrundarlagið og gera skipanina truplari at fyrisita hjá bæði vinnu og myndugleikum.

Lagt kann verða afturat, at landið longu hevur fingið hægri inntøkur frá mvg vegna hækkandi oljuprísir.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lóggávan ávirkar mvg-uppgerðirnar hjá oljufeløgunum eina ferð. Fyrisitingarliga ávirkanin av hesum er avmarkað. Harafturat kemur eftirlitsuppgávan hjá TAKS, sum skal kunna halda eyguni við, hvat veruliga er selt í stuðulstíðarskeiðinum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Av tí at stuðulin verður veittur sum mvg-frítøka, hevur tað lítla og onga ávirkan á vinnuna, tí vinnan fær mvg afturborið óansæð.

Hugsast kann, at broytingin kann elva til, at tað gerst truplari hjá fyritøkum at avgreiða sín mvg roknskap, tí skiljast skal millum brennievni við og uttan mvg. Men av tí, at diesel longu innheldur brennioljugjald, sum ikki verður álagt mvg, er tað ikki so einfalt at rokna út mvg'ið.

Tí er avgerandi, at oljusølurnar klára at umsita broytingar, so kundin sær, hvussu nógv mvg er goldið.

Fyri oljufeløgini kann broytingin fáa ávísar aðrar umsitingarligar avleiðingar, tí helst skulu gerast fleiri mvg-uppgerðir.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Ivasamt er, um tíðaravmarkaða mvg-frítøkan fær ávirkan á ferðsluna og útlátið. Hugsast kann tó, at signalið um at landið tekur váðan, tá oljuprísurin sveiggjar, kann seinka grønu umleggingini.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Broytingin hevur ikki beinleiðis ávrikan á serstøk øki í landinum, men helst kemur stuðulin serliga økjum til góðar, har fólk hava størri tørv á bili.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður, at pendlarar, sum brúka egnan bil til og frá arbeiði, merkja lættan best.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur onga ávirkan millumtjóða sáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur onga ávirkan á tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Uppskotið hevur onga markaforðingar ella ávirkan á flytføri.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur onga áseting um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt avgjaldsmál.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur onga áseting um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur teimum, ið selja bensin og diesel í eitt tíðaravmarkað skeið, um ikki at krevja inn mvg.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?

Uppskotið heimilar ikki viðgerð av persónupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ongar aðrar avleiðingar.

2.18. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Ja	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Eftir uppskotinum verður søla av bensini og diesel, ið kemur undir vørunumrini 2710.12.41, 2710.12.45, 2710.12.49, 2710.12.50, 2710.19.43 og 2710.19.46 í Toll- og Vøruskránni frítikin fyri mvg fram til og við 31. juli 2026.

Tað merkir, at søla av bensin og diesel ikki verður álagt mvg frá gildiskomu fram til og við 31. juli 2026. Frá 1. august verður mvg á 25% aftur álagt søluna av bensin og diesel.

Til § 2
Áseting um gildiskomu og sólseturáseting. Lógin fer úr gildi 5 mánaðir eftir, at mvg-fría tíðarskeiðið endar, so at tað sæst, hvat hevur verið galdandi, tá ið mvg-uppgerðin skal gerast eftir 3. ársfjórðing 2026.

Fíggjarmálaráðið, 24. apríl 2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur